

*Eyðun Christiansen, nýggjur aðalskrivari í Kommusamskipan Føroya, og Heðin Mortesen, borgarstjóri í Havn og formaður í KSF*

## Eyðun Christiansen nýggjur aðalskrivari

Stýrið fyri Kommunusamskipan Føroya hevur sett Eyðun Christiansen í starv sum aðalskrivara felagsins. 22 umsóknir vóru til starvið. Eyðun Christiansen hevur drúgvar royndir m.a. sum ráðgevi hjá Føroya Kommunufelag farnu sjey árini. Í hesum starvi hevur hann havt høvuðsábyrgdina at veita kommunum fakliga og politiska ráðgeving um øll kommunal viðurskifti. Í hesum sambandi hevur hann eisini tikið lut í øllum samráðingum og fakligum útgreiningararbeiðum, sum hava við kommunal viðurskifti og uppgávu- og ábyrgdarbýtið millum land og kommunur at gera. Hann var millum annað limur í kommunalu umskipanarnevndini, sum Innlendismálaráðið setti í fjør at fyrireika komandi kommunalu umskipanina. Eyðun Christiansen hevur samfelagsvísindaliga útbúgving frá hægri lærustovni, og byrjar í starvinum sum aðalskrivari hjá Kommunusamskipan Føroya skjótast tilber.

# gongukvinna heiðraði



## Sum ein mostir fyri okkum

Við støði stuttsøguni hjá H.C Andersen um "Mostir", sum fataði leikhúsi sum sín skúla, bar stjórin á Tjóðpallinum Jenny C. Petersen fram heiðurskvøðu til Lauru Joensen, har hon millum annað segði:

- Á mangan hátt ert tú Laura sum ein mostir fyri okkum øll. Lukkutíð fyri okkum hevði tú longu sum 14 ára gomul tað árræðið, sum hevur merkt teg líka síðani,

Tað eru so nógvir leikir, sum koma fram fyri okkum, tá vit hugsa um Lauru Joensen á palli: Kærleikssøga aldarinnar, Feit og fregin, Eitt dukkuheim, Logi, logi eldur mín, Glataðu spælimenninir, Shirley Valentine - ja, vit kundu hildið áðfram.

- Tú hevur ferðast kring landi sum sjónleikari og leikstjóri. Ongin krókur í landinum hevur verið ov fjarðskotin, og ongin uppgáva ov lítil. Tú hevur spælt, leikstjórna og týtt leikir, arbeitt við tí fyrisitingarliga og verið undangongukvinna fyri at fáa stovnsett ein Tjóðpall. Tú hevur ósjálvsøkin arbeitt fyri at føroyskur sjónleikur og tey, sum arbeiða innan listi sum heild, skuldu fáa betri kor.

- Um tú hevði fingið løn fyri tað stríð og tey avrik, tú hevur útint fyri at ríka okkum løturnar, so vart tú uttan iva vælhavandi í dag.

- Tó at tú hevur havt tungar løtur og strævnar dagar, hevur tú altíð stríðst fyri tí, tú helt vera rætt, og herjað á aftur.

## Mentanarvirðisløn Landsins:

Í kunngerðini fyri at lata Mentanarvirðisløn Landsins stendur millum annað, at endamálið við at veita virðislønina er at heiðra føroyskt mentafólk sum tøkk fyri útint listarligt avrik, og til tess at kunna fáa Mentanarvirðisløn Landsins skal virðislønarnevnið hava skapað listaverk á høgum støði.

1998: Regin Dahl
1999: Jens Pauli Heinesen
2000: Ingálvur av Reyni
2001: Eyðun Johannessen
2002: Gunnar Hoydal
2003: Hanus Kamban
2004: - eingin virðisløn latin
2005: Tita Vinther
2006: Zacharias Heinesen
2007: - eingin virðisløn latin
2008: Ebba Hentze
2009: Kári P.

## Heiðursgáva Landsins

Í kunngerðini fyri at lata Heiðursgávu Landsins stendur millum annað, at virðislønarevnið skal hava virkað til frama fyri mentanarlig virði, sum hava týdning fyri føroyska mentan, list og mentanararv.

2001: Fuglafjarðar Sjónleikarafelag
2002: Axel Torgarð
2003: Ólavur Hátún
2004: - eingin heiðursgáva latin
2005: Emil Juul Thomsen
2006: Jógvan Isaksen
2007: - eingin virðisløn latin
2008: Martin Tórgarð
2009: Laura Joensen



## Nú er nokk klappað...

Rói Patursson bar fram kvøðu til Kára P har hann millum annað segði:

- Míni orð í kvøld eru hvørki ein søgulig kvøða ella ein afturlítandi røða. Í teimum skrivaðu og komponeraðu vísunum hjá Kára P hava hittinorðini og tær skeivu viðmerkingarnar úr gerandisskemtinum eitt kenslusterkari andlit, sum kann skifta ímillum ovfarakæti og tíðarleysa utopi, men eisini desperata ironi. Tað einasta, tú ongastaðni møtir, er líkasæla.

- Eins og tær skræddu lagnurnar og hugans menniskju, sum Kári skrivar um, eru eisini vit í gullkálvakonkurrensuni. Eg veit ikki, um spitarin er í botni. Er tað nakar, sum kennir ferðina og kósina? Men eitt haldi eg meg vita - vit geva okkum framvegis ikki tíð til at spyrja um hvagar og hví.

- Viðhvørt upplivi eg Kárasa gullkálvadans sum eina mynd av tí »Blinda liðnum« hjá Christiani Matras, tá tað er gingið amok.

- Kári P hevur altíð verið tann, sum ger gjøldur burtur úr maktmáli og ideologiskum valdi. Hann er skjótur at gera vart við, at nú er nokk klappað. Hann sær tað rukkuta í tí slætta, tað skrukkuta í tí hátíðarliga og tað ivasama í øllum harradømi, um tað so eru politikarar, ríkmenn ella sálarhirðar.

- Í dag er tað blivið so populert millum summar politikarar at hótta. Serliga tey gomlu, haldi eg, - við ótryggleikum av ymiskum slag. Tí má tað sigast at vera í røttum tíma, at landsstýriskvinnan í mentamálum, Helena Dam á Neystabø, nú hevur givið landsins tignarligastu viðurkenning til multikunstnaran Kára P, sum umframt so nógv annað gav okkum Kalla Katt, Herluf, Ljósið hinumegin endurtøkurnar og áhaldandi eggjar okkum til at ganga út úr takt.

- Í hesum samanhangi er tað eisini neyðugt at nevna Bob Dylan... Nei, tað er tað yvirhøvur ikki...